# Bilar

Nr. 138 • hósdagur • 22. juli 2004 • 78. árg.

# Aftur ein sjúkrabilur uppbygdur á Landssjúkrahúsinum




*Á Landssjúkrahúsinum hava teir nú uppbygt sín næsta sjúkrabil í ár. Her er Jógvan Páll Hansen, vaktleiðari á Sjúkraflutningstænastuni, við nýggja Mercedes-Benz Sprinter sjúkrabilinum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

**Fyrr í ár tók Landssjúkrahúsið ein sjúkrabil í brúk, sum teir sjálvir høvdu uppbygt. Nú hava teir uppbygt tann næsta, ein Mercedes-Benz Sprinter, ið er sum skræddaraseymaður til teirra brúk**

SJÚKRABILUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Á Landssjúkrahúsinum eru teir við at spesialisera seg í at uppbyggja sínar egnu sjúkrabilar.

Bara í ár hava teir uppbygt tveir sjúkrabilar, fyrst ein Toyota Hiace og nú ein Mercedes-Benz Sprinter.

Ein fyrimunur við at vit uppbyggja okkara egnu bilar er, at teir so at siga verða skræddaraseymaðir til okkara brúk, sigur Atli Simonsen, varaleiðari á Sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum, sum hevur staðið fyri arbeiðinum og gjørt meginpartin sjálvur.

Bilurin er ein Mercedes-Benz Sprinter 316 CDi við 2.7 litur 5 syl. dieselmotori og automatiskaum girum.

Annars hevur hann alt tað, sum hoyrir til ein nútímans sjúkrabil, skáp og hillar eru gjørd soleiðis, at tað passar til bilin og sær út sum originalt. Í bilinum er alt tað, sum brúk er fyri í eini neyðstøðu, sum til dømis útgerð til at geva stoyt til ein persón, sum hevur fingið hjartastopp o.l.

Arbeiðið er væl úr hondum greitt, og eingin munur er á hesum bilinum og sjúkrabilum, sum vera uppbygdir uttanlands.



*Bilurin hevur alt tað, sum hoyrir til ein nútímans sjúkrabil, skáp og hillar eru gjørd soleiðis, at tað passar til bilin og sær út sum originalt.*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*



TODAL, Velbastaður:

# Viðfestisvognar uppbygdir sum bilar




*Tórfinnur Dalsgarð á Velbastað umboðar norsku Tredal viðfestisvognarnar í Føroyum. Her er hann saman við 11 ára gamla soninum, Rógva*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tórfinnur Dalsgarð, bóndi á Velbastað, umboðar norsku Tredal viðfestirvognarnar, sum eru uppbygdir á sama hátt sum bilar og sera góðir at sleipa - eisini á ójøvnum undirlendi**

VIÐFESTISVOGNAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Viðfestisvognar er eitt nógv nýtt arbeiðstól innan fleiri vinnugreinar, sum t.d. dømis hjá bóndum og handverkarum innan byggivinnuna. Eisini til at sleipa bátar og til flutning av rossum.

Tórfinnur Dalsgarð, bóndi á Velbastað, umboðar norsku Tredal viðfestisvognarnar, sum eru kendir fyri sínar góðu koyrieginleikar. Teir eru uppbygdir á sama hátt sum bilar við t.d. svingarmum, spiralfjaðrum og stoytdoyvarum. Hetta ger at vognarnir eru sera góðir at sleipa - eisini á ójøvnum undirlendi.

Tórfinnur Dalsgarð, frá Todal á Velbastað, sigur, at vognarnir eru sera væl egnaðir til at brúka í Føroyum, dygdin er góð og prísirnir kappingarførir.

Tredal A/S er ein yvir hundrað ára gomul norsk fyritøka, sum bleiv stovnað í 1895. Fyrstu nógvu árini gjørdu teir hestavognar og sleður. Miðskeiðis í 50-unum løgdu teir um til at framleiða viðfestisvognar til mong ymisk endamál.

Vognarnir eru at fáa hjá TODAL v. Tórfinni Dalsgarð, Gerðisbreyt 2 á Velbastað.
Telefon 328101/ 218101,
teldupost:
todal@post.olivant.fo

Leveringstíðin er ein til tvær vikur. Á goymslu er Tredal 5-550 R, sum er tann minsti í vørskránni.




*Tredal vognarnir eru væl egnaðir til føroysku vegirnar*




*Tredal viðfestisvognarnir eru uppbygdir á sama hátt sum bilar við svingarmum, spiralfjaðrum og stoytdoyvarum*

## 1. millión Hyundai



Hyundai verksmiðjan í Suðurkorea útflutti í fjør meira enn 1. millión bilar. Hátíðarhald var í havnabýnum Ulsan, har stóru bilferjurnar heinta bilarnar, tá bilur nr. 1. millión bleiv heintaður

*Kelda: Hyundai kundemagasin*

## BMW til Blair og Charles



Í Onglandi hava Scotland Yard bílagt tveir pansarauppbygdar BMW-700 til ávikavist forsætisráðharran Tony Blair og Charles prins, sum báðir annars eru vanir at koyra í enskum bilum

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nógvir nýggir Suzuki



Eftir ætlan koma fleiri nýggir Suzuki á marknaðin fram til 2009. Í 2005 kemur ein nýggjur Swift, bygdur yvir Concept S, og ein nýggjur Vitara. Nýggjur Wagon R kemur í 2006 og ein nýggjur Grand Vitara í 2008

*Kelda: Motor Magasinet*